# Les yrkistekstir áðrenn, meðan og aftaná

Her fært tú frágreiðing um, hvussu tú lesur ein yrkistekst.

**Áðrenn**

Áðrenn tú byrjar at lesa, skalt tú gera tær greitt, hvat **lesiendamálið** er.

**Lesiendamál**
Endamálið við tínari lesing er, at tú fært at vita tað, sum tú hevur brúk fyri at vita, t.d. at læra um barnabókmentir, at loysa eina uppgávu í støddfrøði ella njóta eina góða **skaldsøgu**.

**Meðan tú lesur**

Meðan tú lesur, skalt tú skriva viðmerkingar um tað, tú ætlar tær at minnast.

Tveyteigaskriv

Tú kanst brúka eitt tveyteigaskriv, tá ið tú skalt savna nýggja vitan. Í fyrsta teigin skrivar tú yvirskriftina til eitt brot, og í hin teigin skrivar tú tað, tú fegin vilt minnast.

Áðrenn tú fert at nærlesa tekstirnar, skalt tú gera tær eitt yvirlit yvir teir.

**Yvirlitslesing**
Yvirlitslesing er ein lesiháttur, har vit skjótt kaga ígjøgnum tekstin. Vit lesa bara yvirskriftir, myndir, myndartekstir og alt tað, sum ikki er **breyðtekstur**.

**Aftan á lesingina**

Tá ið tú hevur lisið, skalt tú savna tínar viðmerkingar saman, og tú skalt arbeiða við tíni nýggju vitan.

**Samandráttur**
Ein samandráttur er ein stutt lýsing av tí, sum tú heldur er umráðandi at minnast úr tekstinum.

NEM í fimta síða 208